# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit fara framvegis at samstarva við pakistanar og eggja teimum til at tvífalda átakið ímóti teimum víðgongdu*

*Condoleezza Rice*

# Taka seg aftur men ikki út

**Russland hevur lovað at taka sínar herdeildir í Georgia aftur, men ikki úr landinum, sigur russiski varaherovastin**

Anatoly Nogovitsyn, generalur, sigur við russisku tíðindastovurnar, at russiski herurin er farin undir afturtøkuna sambært vápnahvíldaravtaluni, sum Russland og Georgia staðfestu leygardagin. Men sambært generalinum eru málsligir trupulleikar uppií.

- Tað er munur á ensku orðunum "pullout" og "withdrawal", og í samráðingunum við franska forsetan, sum kom við friðaruppskotinum, tosaðu vit um "pullout" og ikki um "withdrawal", sigur russiski varaherovastin sambært Sky News.

- Vit hava sostatt lovað at taka okkum aftur, men ikki út, sigur Anatoly Nogovitsyn, generalur.



*Myndatekstur: Anatoly Nogovitsyn er varaovasti í russisku herleiðsluni*
*Mynd: Polfoto*

# Umheimurin vónar frið og trygd í og við Pakistan

**Altjóða samfelagið vónar, at tann næsti forsetin í Pakistan kann tryggja demokratiið í landinum. USA vónar, at eftirmaðurin hjá Musharaf fer at temja tær víðgongdu kreftirnar**

- Vit fara framhaldandi at arbeiða saman við Pakistan, og vit eggja landsins leiðarum til at leggja munandi størri dent á at temja tær víðgongdu kreftirnar, sum gera alt meiri og meiri um seg, segði amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, eftir at Pervez Musharaf hevði kunngjørt, at hann legði frá sær sum pakistanskur forseti.

Í øðrum londum søgdu politiskir leiðarar seg vóna, at tann komandi leiðarin í Pakistan verður førur fyri at tryggja demokrati og frið í landinum.

- Tann týska stjórnin vónar, at ein demokratiskt vald stjórn og ein komandi demokratiskt valdur forseti fara at stuðla upp undir landsins demokratisku skipan og stovnar, segði ein talsmaður fyri uttanríkisráðið í Berlin. Talsmaðurin legði afturat, at Týskland fer framhaldandi at samstarva við Pakistan, og at hetta samstarv helst skal medvirka til støðug viðurskifti og frið, ikki bara í Pakistan, men eisini í grannalandinum Afghanistan.

Eisini franska stjórnin vónar, at skiftið í pakistonsku leiðsluni kann tryggja støðug viðurskifti frameftir.

- Tað er okkara ynski, at tann næsti forsetin og pakistanska stjórnin vilja samstarva við virðing fyri teimum demokratisku skipanunum og taka við teimum avbjóðingum, sum framtíðin fer at hava við sær, segði talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í París. Viðmerkingin úr Moskva bar á sama borðið.

-Russland vónar, at avgerðin hjá Musharaf at fara frá ikki fær óhepnar avleiðingar fyri ta politisku støðuna í tí týdningarmikla asiatiska landinum, segði uttanríkisráðið í Moskva.



*Í bardaganum ímóti yvirgangi var Musharaf trúgvur stuðul hjá George W. Bush, forseta*
*Mynd: Polfoto*



*Pakistanskir sakførarar fegnaðust um avgerðina hjá forsetanum at fara frá*
*Mynd: Polfoto*

## Tøgn í India

Pakistan er fyrrverandi bretskt hjáland, og bretska stjórnin hevur fylgt gongdini í Pakistan gjølla. David Milliband, uttanríkisráðharri, segði í gjár, at avgerðin hjá Musharaf er endin á einum truplum tíðarskeiði í pakistonsku søguni, sum eisini hevur verið trupult fyri viðurskiftini við Bretland og onnur lond. Ein talsmaður hjá Gordon Brown, forsætisráðharra, skoytti uppí, at einstaklingar eru ikki og eiga ikki at vera avgerandi fyri viðurskiftini landanna millum.

Í grannalandinum India vilja teir politisku leiðararnir ikki gera nakrar viðmerkingar til avgerðina hjá Musharaf. Tað einasta, sum New Dehli hevur sagt, er, avgerðin er eitt úrslit av innanhýsis pakistonskum viðurskiftum.

Tað eru annars bara nakrir fáir dagar, síðani indiska stjórnin bað pakistonsku leiðararnar taka sær av muslimskum yvirgangskreftum, sum javnan gera um seg í India, og sum sambært indiskum myndugleikum fáa hjálp úr Pakistan.

## STUTT SAGT

### Tryggari í Ísrael enn í USA

Mike Huckabie, sum er fyrrverandi guvernørur í amerikanska statinum Arkansas, og sum royndi at stilla upp til forsetavalið fyri republikanararnar, hevur vakt ans eftir eina vitjan í Miðeystri.

Á ferðini vitjaði hann millum annað í Ísrael, og eftir at vera farin haðani segði hann, at tað var minst líka trygt at vera í Ísrael sum í USA. Í hvussu er greiddi hann tíðindafólki frá, at hann hevði kent seg líka tryggan í Ísrael sum í nógvum býum í USA. Mike Huckabee vildi ikki siga, um hann hevði ávísar amerikanskar býir í tonkunum. Harafturímóti vildi hann fegin siga, at hann hevði samanborið teir amerikonsku býirnar við Tel Aviv, skrivar New York Times.

Mike Huckabee hevur verið nevndur sum møguligt varaforsetaevni hjá John McCain á forsetavalinum í heyst.



*Mike Huckabee*
*Mynd: Polfoto*

### Reykjavík 222 ár

Júst sum klaksvíkingar kunnu hátíðarhalda, at 100 ár eru liðin, síðani Klaksvíkar kommuna varð skipað, kunnu fólk í Reykjavík hátíðarhalda, at 222 ár eru liðin, síðani býurin fekk støðu sum keypstaður. Býarsøgan er kortini nógv longri enn so, tí sambært søguni setti landnámsmaðurin Ingólfur Arnarson fótin á land har fyri meiri enn 1130 árum síðani.

Fyri 22 árum síðani var stórt hátíðarhald í íslendska høvuðsstaðnum, tá býrurin hevði 200 ára á baki sum keypstaður. Íslendsku bløðini skriva, at kanska er haldið ikki so sermerkt hesaferð, men at tað góða veðrið í summar kortini hevur havt stóra ávirkan á hýrin í býnum og hátíðarhaldið. Eitt úrslit av tí góða summarveðinum var, at hesaferð bleiv tann vakrasti urtagarðurin í býnum valdur og eigarin heiðraður.

